# Nýtt álop á Facebook

Trygdarfyritøkan CSIS sigur nú frá, at eitt nýtt ormaálop ger um seg umvegis Facebook. Fært tú boðini »Oh my godd! You loook so funnny in thhis videoo«, ræður um at ansa sær. Trýstir tú á leinkjuna, sum er saman við boðunum, kemur tú á eina síðu, har tín telda verður tappað fyri ymsar upplýsingar. Hartil er vandi fyri, at teldan verður partur av einum bot-kervi, sum teldusníkar nýta til at senda spam-postar.



# Nýggj rusk-skipan í Havn

Tórshavnar kommuna hevur broytt skipanina við ruskposum til húsarhaldsburturkast. Heldur enn at leggja ein posa við hvørja skrellispann, tá hesar verða tømdar, fáa húskini nú eina rullu við 28 posum um hálvárið. Hava húskini tørv á fleiri posum, ber til at nýta vinnuposar, ið kommunan eisini heintar. Vinnuposar kunnu keypast í handlum í býnum. Aðrir posar verða ikki heintaðir, og fleiri posar verða ikki útflýggjaðir ókeypis. Hartil hava stór húski – t.e. húski við í minsta lagi fimm fólkum – rætt til tvær rullur tvær ferðir um árið.

# Ein kilometur av terassu

**Gott uttandura umhvørvi. Føroya størsta markisa og infrareyðar hitakanónir er tað, sum nýggja caré'in í Miðbýnum, Mica, sigur seg hava fram um onnur**

BÝARLÍV
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*Karmarnir eru mest sum í Nyhavnini á stóru terassuni aftan fyri Mica*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

- Eg hevði lagt til merkis, at bygningurin stóð tómur, og so byrjaði eg spakuliga at spæla mær við tankanum um, hvat kundi gerast her.

Soleiðis sigur Hans Michael Hansen, sum klokkan 17 í dag letur dyrnar upp í nýggjasta ískoytinum til miðbýarlívið í Havn.

Tað er nú úti við hálvt ár síðani, at tankin fór at spøkja í høvdinum hjá Hans Michael, og síðani hevur talan verið um nógv og hart arbeiði í hølunum, har DER á sinni plagdi at halda til.

- Vit hava innrættað at kalla alt av nýggjum. Og so hava vit gjørt stóru terassuna, sum eg vænti verður drívmegin í projektinum. Her er ein kilometur av terassubrettum, og til ber hjá fólki at sita heitt undir stóru markisuni. So eg ivist ikki í, at hetta er nakað, sum kann skapa eitt gott umhvørvi hjá gestunum, sigur Hans Michael.

Ætlandi verður køkurin á nýggju café'ini opin til klokkkan 21 hvørt kvøld. Sjálv café'in kemur tó at hava opið nakað longri. Ikki minst um vikuskiftini, tá opið verður til klokkan 4 leygar- og sunnunátt.

Í dag klokkan 18 verður livandi tónleikur við Kim Hansen og Jens Marna Hansen.

# SEV vil hækka el-prísin

**SEV hevði risa-hall í ársroknskapinum fyri 2008. Stendur tað til felagsskapin, verða el-prísirnir hækkaðir 4 oyru fyri kilowatttíman, men myndugleikarnir fara neyvan at loyva hesum**

ROKNSKAPUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Árið í fjør hilnaðist illa fíggjarliga hjá Elfelagnum SEV.

Tað vísir roknskapurin fyri 2008, ið varð lagdur fram á ársaðalfundi felagsins á Hotel Føroyum fyrrapartin. Rakstrarúrslitið gjørdist eitt hall uppá 31,1 mió. kr. móti einum avlopi uppá umleið 12 mió. kr. í 2007. Í fíggjarætlanini fyri 2008 varð roknað við einum rakstrarhalli uppá slakar 2 mió. kr.

- Útreiðsluvøksturin stavar fyrst og fremst frá óvanliga høgum oljuprísum, sum vóru í hæddini á sumri 2008, umframt frá øðrum viðurskiftum, sum td. vanligum lønar- og prísvøkstri og frá serligum rakstrarútreiðslum, sum ikki koma fyri ár um ár, sigur SEV-leiðslan í viðmerkingunum til roknskapin.

Oljuútreiðslurnar vóru 119,9 mió. kr. móti 72,6 mió. kr. árið fyri.

Í fíggjarætlanini hjá SEV fyri 2009 verður roknað við einum rakstraravlopi uppá 57,9 mió. kr. fyri avskrivingar uppá 50 mió. kr. ella 7,9 mió. kr. eftir avskrivingar.

Metingarnar av inntøkuni fyri 2009 byggja á, at SEV fær loyvi at hækka allar elprísir 4 oyru/kWh frá 1. januar 2009, og at elnýtslan verður tann sama sum í fjør.

Hinvegin er ikki líkt til, at SEV fær loyvi frá myndugleikunum at hækka elprísirnar, og tí verður inntøkan helst einar 10 mió. kr. minni enn ásett í fíggjarætlanini.

# Oljan lækkar prístalið

**Brúkaraprístalið fór 1,2 prosent niður frá fyrsta ársfjórðingi í fjør til fyrsta ársfjórðing í ár. Men hækkandi prísir á matvøru forða eini enn størri lækking**

PRÍSTAL
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*




*Svarta strikan vísir gongdina í samlaða brúkaraprístalinum. Grøna strikan vísir prístalið á mati og drekka*

*Mynd: www.hagstova.fo*

Tað eru lækkandi prísirnir á brennievni, sum hava størstu ávirkanina á fallið í prístalinum, skrivar Hagstovan á heimasíðu sínari.

Prísurin á brenniolju til húsarhald er farin 25,8 prosent niður, og prísirnir á brennievni til bilar 19,3 prosent. Prísirnir á ferðing uttanlands eru lækkaðir 6,7 prosent og klæðnaprísirnir 2,1 prosent.

Tað hava eisini verið príshækkingar seinasta ársfjórðingin. Rentan á íbúðalánum er hækkað 5,6 prosent, og prísirnir á tryggingum og fíggjartænastum eru uppfarnir ávikavist 9,3 og 8,7 prosent.

Prísirnir á mati og drekka eru hækkaðir 4,5 prosent og hava størstu ávirkanina á árliga prísvøksturin. Prísirnir á rúsdrekka og tubbaki eru farnir 8,7 prosent upp.

Frá fyrsta ársfjórðingi 2009 er nýtt vektargrundarlag tikið í nýtslu til útrokning av brúkaraprístalinum. Nýggja vektargrundarlagið er grundað á nýtslumynstrið hjá húsarhaldunum í 2007.